# Keyp Sosialin í leysasølu á netinum

**Lætt og ómakaleyst ber til at keypa Sosialin í pdf-útgávu á internetinum**

BLAÐÚTGÁVA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í farnu viku var liðið eitt ár síðani, at Sosialurin lá tøkur á internetinum í eini pdf útgávu. Tað merkir, at til ber at keypa sær atgongd til Sosialin á netinum, har tú sært blaðið, júst soleiðis, sum tað sær út í veruleikanum. Til ber at lesa blaðið á telduni ella at prenta síðurnar út.

Tað var tann 7. mai í fjør, at fyrsta blaðið varð lagt út, og síðani tá eru øll bløðini løgd afturat savninum. Tú fært atgongd til pdf-Sosialin við at keypa tær atgongd á http://kiosk.sosialurin.fo

Tað eru tríggir ymsir møguleikar. Tú kanst keypa tær atgongd í ein dag. Tað kostar 13 krónur. Men tá hevur tú atgongd til alt savnið – og tú kanst lesa higartil øll tey 260 bløðini í savninum. Men tá er atgongdin bara galdandi í ein dag.

Tú kanst eisini keypa tær eitt mánaðarhald. Tá hevur tú atgongd til savnið í ein mánað. Hetta kostar 150 krónur fyri mánaðin.

Triði møguleikin er, at tú keypir tær eitt árshald. Tað kostar 1.000 krónur, og tá hevur tú atgongd til savnið í eitt heilt ár.

Tað er sera einfalt at keypa sær atgongd umvegis internetið. Tú rindar við gjaldkorti, lætt og ómakaleyst.

Við at keypa eitt blað sparir tú tvær krónur í mun til leysasøluprísin. Tó leygardag fýra krónur. Vit at keypa tær eitt mánaðarhald ella árshald, verður sparingin munandi størri, tí við árshaldinum kemur tú niður á 83 krónur um mánaðin – og tað er niðan fyri fýra krónur fyri blaðið.




*Tað er sera hent at kunna keypa Sosialin í leysasølu á netinum. Serliga hjá teimum, sum eru uttanlands ella ikki hava eina blaðsølu við hondina. Við einum árshaldi fæst hvørt blaðið fyri slakar tríggjar krónur*

Tað eru 11 ár síðani, at Sosialurin gjørdist tøkur á internetinum við Internet-Sosialinum. Alment varð InternetSosialurin lagdur á netið 27. november í 1997, og har eru bløðini tøk frá september 1997 til dagin í dag. Munurin millum internetútgávuna og pdf-útgávuna er, at í internetútgávuni er bara tekstur og einstakar myndir, meðan tú í pdf-útgávuni hevur alt tað sama, sum í prentaðu útgávuni, tí her er talan um eitt kopi av prentaðu útgávuni.

Tað eru serliga tey, sum ikki hava so lætt at fáa hendur á blaðnum, útisetar og fólk sum ferðast, sum hava serliga gleði av pdf-útgávuni og internetútgávuni av Sosialinum. Pdf-útgávan av dagsins blað er vanliga tøk stutt eftir klokkan 13, tá blaðið er farið til prentingar.

Sosialurin fæst í fýra ymsum útgávum:

Prentaða blaðið, sum fæst í leysasølu og sum tú kanst tekna teg sum haldara av.

InternetSosialuin – www.sosialurin.fo

Pdf útgávan – http://kiosk.sosialurin.fo

SkipsSosialurin, sum er eina útgáva av InternetSosialinum, sum verður send sum teldupostur. Tað eru serliga sjófólk, ið nýta hendan møguleikan, tí teirra atgongd til internetið ofta er avmarkað.

Tíðindi frá Sosialurin og Rás 2 kunnu eisini lesast á portalinum, www.portal.fo og sum Flags í fartelefonum frá Føroya Tele.

ERU TIT KLÁR TIL STRONDINA?
5 VIKUR OG TÚ ERT KLÁR/UR

Avmarkað pláss



**Kom og ven** 3 dagar um vikuna. Mánadag, mikudag og fríggjadag. Vit hava 2 skeið. Eitt um morgunin frá kl. 7 til kl. 8 og eitt á kvøldi frá kl. 21 til 22. Fá eina matskrá, máta feittprosent, máta ummál og vekt. Vit eru við tær alla tíðina.

Ven á einum liði, har øll koma fyri at náa einum máli. Nevniliga at síggja so væl út sum til ber, tá strondin er fyri framman.
Tú fært betri kondi. Tú orkar betur, tá tú kemur fram til feriustaðið. Tú følir teg betur tilpassar. Ja, alt er bara tað reina luksus.

Og so at hugsa sær, at alt hetta bert kostar kr. 1200,-. Og um tú vilt vera vísur í at røkka tínum máli, kanst tú venja hálvan tíma " hvíludagarnar", tvs. týsdag, hósdag, leygardag og sunnudag. Tá kostar tað bert kr. 1500,-

Hálvur tími eyka í "hvílidøgunum" Bert 300,- kr. eyka

yndifitness

YVIRI VIÐ STROND 21 · TÓRSHAVN · TEL 311 311 · YNDI@YNDI.FO